einfaldari
- ger tað einfaldari
Mars 2012

# Hugsjónirnar fyri Lívdina




*Tær fimm grundsúlurnar undir samkomuni: Samfelag, Læra, Tilbiðjan, Tænasta og Trúboðan*

- At kunngera gleðiboðskapin á ein hátt, sum er viðkomandi fyri føroyingar í 21. øld.
- At hava eina samkomu, har øll tey, sum eru sorgarbundin, niðurboygd, vónleys og friðleys, kunnu finna kærleika, gleði, vón og frið í Kristusi.
- At senda trúboðarar út um allan heim - og stuðla teimum andaliga og fíggjarliga.
- At uppbyggja og stimbra børn Guds í Orðinum, soleiðis at tey nýta og menna gávur sínar.
- At hava livandi tilbiðjan og lovsong.

## Broyt mítt hjarta, Gud



Vikuskiftið 16.-18. mars fara vit í Lívdini vestur til Zarepta at hava okkara samkomulegu. Og vit eru fleiri, sum gleða okkum til at fara, tí undanfarnar samkomulegur hava verið einastandandi og mugu roknast sum sera týdningarmiklir varðar í okkara næstan 11 ára longu samkomusøgu.

Evnið hjá okkum hesaferð verður “Broyt mítt hjarta Gud” og er grundað á Lukas 24, 32, sum sigur: »Teir søgdu nú hvør við annan: "Brann ikki hjartað í okkum, tá ið Hann talaði við okkum á vegnum og læt okkum upp skriftirnar!«. Jesus hevði, sum hann fylgdist við teimum báðum á veg til Emmaus, talað og latið skriftirnar upp fyri teimum, og hetta fekk hjørtu teirra at brenna. Um Jesus fær hjørtu okkara at brenna, tá broytast okkara hjørtu.

So vón okkara er, at sum vit fara at hyggja inn í skriftirnar á samkomuleguni á Zarepta, at Jesus Kristus sleppur framat at tala til hvønn einstakan okkara og lata upp skriftirnar, so at hjørtu okkara fara at brenna ... og verða broytt.

*Absalon Áargarð*

# HENDINGAR & TILTØK

## Masterclass í samskifti

"Øll, ið samskifta, finna skjótt út av, at tað at megna at samskifta klárt og týðiliga inniber nógv meir enn bara tey orðini, sum verða nýtt. Tað er eitt kynstur, sum krevur áhaldandi at verða ment," sigur bretin og pastorurin Paul Scanlon, sum fer at hava skeið í samskifti í Frítíðardeplinum í Skálavík mikudagin 28. mars. Skeiðið ber heitið “Masterclass in Communication."

Meira fæst at vita um skeiðið, tilmelding o.a. á heimasíðuni hjá Frítíðardeplinum í Skálavík www.depil.fo ella á www.alm.org.uk/lifeachievers/

## TeenStreet 2012




Tilmeldingin til TeenStreet 2012 er byrjað. Legan verður í Oldenburg í Týsklandi frá 28. juli til 4. august. Les meira um ferðing og prísir á www.teenstreet.fo undir "Alt um TS2012". Seinasta freist at tekna seg er 22. apríl.

## Røðin um kvinnuna er byrjað



*Anja og Terje Hansen frá IKTUS við sínum upptøkutólum. Mynd: Tórvør Vang.*

Sjónvarpsrásin IKTUS sendir regluliga talur frá Lívdini.

Hálvan februar byrjaði IKTUS at senda røðina "Kvinnan í samkomuni". Hetta eru talur, sum Jógvan Zacharissen hevur hildið í Lívdini. Talan er um 7 partar, sum halda fram hendan mánaðin.

IKTUS sendir mikudag til leygardag kl.11:00, 16:00, 21:00 og 02:00. Sunnudag frá kl.14:30 og 21:00 verður endursent frá vikuni. Sí skránna og les meira á www.iktus.fo.

## Lívdin til Zarepta




Vikuskiftið 16.-18. mars hevur Lívdin samkomulegu á Zarepta. Tí verða eingi tiltøk í Skúlanum við Løgmannabreyt leygarkvøldið 17. og sunnudagin 18. mars.

## Samtalur og forbøn

Fólk frá Glóðini eru tøk aftan á seinna møtið sunnudagar at samtala ella at gera avtalu um samtalu. Glóðin er ein tænasta í Lívdini, sum er ein útrættur armur til menniskju, sum hava eitthvørt at stríðast við sum t.d. tunglyndi, ótta, sorg, vreiði, hjúnabandsviðurskifti ella tvístøður. Fólkini í Glóðini hava tagnarskyldu. Eisini ber til at venda tær til Glóðina á tlf. 280011.

## Bøn og undirvísing

Týskvøld kl. 20.30 er møti í Lonini oman Hoydalar 28. Triðja hvørt týskvøld eru kyknubólkar. Týskvøldið 6. mars er undirvísing kl. 19 og bønarmøti kl. 20.30.

***Skráin fyri týskvøldini mars 2012***

| | |
|---|---|
| Týskvøldið 6. mars: | Trin 2: Andaligur búnaskapur v. Jógvan Zachariassen (2/2) |
| Týskvøldið 13 . mars | Kyknubólkar |
| Týskvøldið 20 . mars | Bønarmøti |
| Týskvøldið 27. mars | Bønarmøti |





## Veitslan hjá Lívdini

Leygarkvøldið 4. februar var samkomuveitslan hjá Lívdini hildin í Oasuni. Á skránni var góður matur, ymiskt skemtiligt og góð samvera. Her eru nakrar myndir frá veitsluni.

*Myndir: Tórvør Vang*





# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

**Sunnudagin 4. mars**

Familjumøti kl. 10.30: Prát við elsta húsbólkin
Anna Háberg skipar fyri

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Bíblian – 66 kærleiksbrøv:
...og hvussu vit liva... (Esaias-Malakias)
Talari: Símun Absalonsen

UngLív kl. 12.00 Evni: Vinarlag
Undirvísari: Unn Zachariassen



Anna



Símun

**Sunnudagin 11. mars**

Familjumøti kl. 10.30: Høgni Háberg Hansen hevur eitt orð

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Bíblian – 66 kærleiksbrøv:
...í hansara ætlan... (Matt-Jóh.Ev)
Talari: Høgni Johannesen

UngLív kl. 12.00 Evni: Kærleiki
Undirvísari: Rúna Hjelm



Unn

**Sunnudagin 18. mars**

Lívdin á Zarepta (eingi tiltøk í skúlanum)



Høgni

**Sunnudagin 25. mars**

Familjumøti kl. 10.30: Sunnudagsskúlin

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Bíblian – 66 kærleiksbrøv:
...í gerandisdegnum... (Ápostlasøgan)
Talari: Jógvan Zachariassen

UngLív kl. 12.00 Evni: Himmalin
Undirvísari: Jens Wang



Rúna

**Ungdómstiltøk:**

Alive: leygarkvøld kl. 21.00
Skráin sæst á Facebook/Ignite.Livdin



Jógvan

* Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni



Jens

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*